Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinta Løwe Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: COVID-19 kanningar

Spurningar:

1. Hvussu nógv hevur landið/heilsuverkið rindað privatum kanningarstovum fyri at taka sær av COVID-19 kanningum síðan mars mánað í fjør, tá koronufarsóttin byrjaði og higartil í ár?

Viðmerkingar:
Landssjúkrahúsið valdi í fjør at útveita COVID-19 kanningar til privatar fyritøkur.
Sambært svari frá landsstýrismanninum í desember í fjør, so er Heilsufrøðiliga Starvsstovan ongantíð spurd um at gera hesar kanningar.
Nú er skjótt hálvtannað ár liðið, síðan koronufarsóttin rakti landið, og tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 12. august 2021

Beinta Løwe Jacobsen